# Sosialurin

Nr. 183 • leygardagur • 27. september 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo









Útróðrarmenn í samtaki:

## Stovna fiskaupp-boðssølu á Eiði

síða 7



Danmission í Føroyum:

## Byggja brýr millum átrúnaðir

síða 6



## Havsbrún fer at framleiða surimi

Síða 14

# Landsstýrið skerjir javnstøðu

**Ger Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, álvara av síni ætlan at skerja rættin hjá pápum at fara í barnsburðarfarloyvi, so er tað eitt afturstig fyri javnstøðupolitikk. Tað sigur Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini**

BARSILSKIPAN

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

– Eg skilji tað als ikki, tí hetta fær stórar avleiðingar. Pápar eru eins góðir til umsorgan, men í Føroyum skulu teir eftir øllum at døma ikki hava hendan møguleikan, sigur Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini.

Barsilsskipanin er í penganeyð. 15 milliónir krónur vanta í at fáa ársins játtan at ganga upp, og komandi ár eru 22,5 milliónir krónur eftir øllum at døma settar ov lítið av á fíggjarlógini til Barsilskipanina, um einki verður broytt.

Ikki eitt oyra verður játtað meiri frá almennari síðu, er týðiliga givið til kennar. Í staðin verður umhugsað at broyta skipanina. Stendur tað til Bjarna Djurholm, so verða tað menninir og tey hægst løntu, sum koma at svíða fyri, at Barsilsskipanin ikki svarar hvørjum sítt. Hann umhugsar at skerja pápaættin at fara í barsilsfarloyvi, so tær tíggju vikurnar, teir kunnu býta við mammuna, vera lækkaðar.

Tað hóvar ikki Javnstøðunevndini, sum kallar tað eitt álvarsligt afturstig fyri javnstøðupolitikkin. Í staðin eftirlýsir Annika Wardum Joensen eina íslendska støðu, har pápakvota hevur ført til, at 85 prosent av øllum pápum fara í barnsburðarfarloyvi.

Síða 5

B36-HB:

# Ársins dystur

Seinastu 10 árini hevur HB vunnið grannauppgerðina 12 ferðir, meðan B36 bert hevur verið við yvirlutan 6 ferðir. Tríggjar ferðir er dysturin endaður við javnleiki. Í morgin stendur gullið uppá spæl, tá havnarliðini aftur bresta saman.

Ítróttur 18-19





Miele

... tær nýtist onga millión fyri at føla teg sum ein

MÍELEONER

Elkeyp
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30
www.hth-kokar.com



Aluminium rullistillads

| | |
|---|---|
| Arbeiðshædd | 6,20m |
| Longd | 3,05m |
| Breidd | 1,41m |

**kr. 14.740** v/mvg
*- er á goymslu -*

pf Klement Petersen

Høgaból · 600 Saltangará · Tel 44 75 60 · Fax 44 84 60 · klp@post.olivant.fo

Minnist til haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!

– síðsti rættstundis gjaldsdagur er 28. september 2003



Arjgjavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo

Sosialurin